# Fundarbók hjá Vestmanna Bygdarráð.
# Bygdarráðsfundur tann 23. mars 2015, kl. $19^{00}$.

**Bygdarráðslimir á fundi:** Pauli T. Petersen, Karl A. Olsen, Malan Stórá, Durita á Heygum og John Zachariassen
**Skrivari:** Maud Poulsen

---

Hilbert Elisson og Herit Magnussen møttu ikki á fundinum.

Til viðgerðar fyri **opnari hurð**:

**Mál 132**
Tilmæli frá Mentanarnevndini um uppskot til, hvussu neystini niðan fyri Johnsa handil kunnu umbyggjast.
J.nr. 02.00.00-P20-1-14

Mentanarnevdnin viðgjørdi á fundi tann 16. mars 2015 uppskot frá Sigbjørn Skúvadal til, hvussu neystini niðan fyri Johnsa handil kunnu umbyggjast.
Nevndin varð biðin um at taka støðu til, um hon er nøgd við uppskotið, ella um tey skulu gerast øðrvísi.

Nevndin mælir til, at neystini verða endurreist, soleiðis sum tey vóru upprunaliga, og at kostnaðar- og tíðarætlan og tekningar verða gjørdar fyri byggingina.
Somuleiðis mælir nevndin bygdarráðnum til at taka økið við kirkjusandin upp til umrøðu.

**Viðv. 132**
Tilmælið varð einmælt samtykt við tí ískoyti, at hæddin verður hækkað, neysta-reisingarnar verður varðveittar, og at neystini verða gjørd sum framsýningarrúm o.a. innan.

Bókin lisin. Fundurin lokin kl. 20.30

Sign.:

Pauli T. Petersen Karl A. Olsen Malan Stórá

Durita á Heygum John Zachariassen